# Bilar

Nr. 128 • hósdagur • 8. juli 2004 • 78. árg.



**NISSAN PRIMERA 2.0**
Árg 1998, Km 55.000. OZ-felgur og píkadekk fygja við. Kr. 90.000.

**Tel. 221176**

# Opið hús hjá Nordcar leygardagin

**Leygardagin 10. juli verður opið hús við móttøku hjá nýggju fyritøkini, Nordcar, við Ringvegin úti við Velbaðstaðvegin í Havn. Fyritøkan umboðar bilmerkini BMW og Fiat**

BILASØLA
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Hálvan apríl 2004 yvirtók nýggja felagið, Nordcar, umboðini fyri BMW og Fiat í Føroyum.

Arbeiðsumstøðurnar hava ikki verið serliga góðar við Velbastaðvegin, síðan teir byrjaðu. Vegna vegarbeiðið hevur verið ringt at koma til, og alt økið rundan um bygningin hevur verið eitt stórt arbeiðspláss.

Nú er alt so gott sum liðugt, og ein nýggj innkoyring er gjørd frá Velbastaðvegnum.

Á goymslu hava teir fingið eitt stórt úrvæl av bæði FIAT og BMW, m.a. tann nýggja BMW 520i og tann nógv eftirspurda Fiat Panda, ið var valdur til ársins bil í Evropa í ár

Fyritøkan er deild upp soleiðis, at mekaniski verkstaðurin og plátuverkstaðurin koyra sum sjálvstøðugar eindir. Aron Justinussen rekur mekaniska verkstaðin undir navninum BF-Service, og Sofus Lognberg rekur plátu- og lakkeringsverkstaðin. Bilsøluni tekur Jens Petur Jensen sær av, umframt at hann er stjóri felagsins. Goymsluni tekur Jákup Klein Olsen sær av, hetta hevur hann eisini gjørt tey seinastu 13 árini. Hesir báðir seinast nevndu eru partaeigarar í fyritøkuni.

Felags móttøka og telefonnummar fyri allar deildirnar er: 30 80 80

Jens Petur Jensen sigur, at nú alt er komið upp á pláss, bjóða teir til móttøku leygardagin 10. juli frá kl. 10-16, og vænta teir at síggja nógv vitjandi hendan dagin. Møguleiki verður fyri at hyggja runt í húsinum og royna nýggjar og brúktar bilar, sjálvandi verður eisini kaffi og okkurt gott afturvið, upplýsir Jens Petur Jensen, stjóri í Nordcar.



*Leygardagin 10. juli frá 10-16 verður opið hús við móttøku hjá Nordcar við Ringvegin úti við Velbaðstaðvegin í Havn. Jens Petur Jensen tekur sær av bilasøluni, umframt at hann er partaeigari og stjóri felagsins*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Jákup Klein Olsen er goymslumaður og partaeigarari í fyritøkuni*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Aron Justinussen rekur mekaniska verkstaðin undir navninum BF-Service*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Sofus Lognberg rekur plátu- og lakkeringsverkstaðin.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*





*Olav Petersen, langabbasonur gamla Wenzel Petersen, hevur gjørt eina sera einfalda og framkomna heimasíðu til P/F Wenzel. Heimasíðan hjá Olavi sjálvum er: http://www.xnet-design.dk/*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

P/F Wenzel, Tórshavn:

# Nýggja einfalda og framkomna heimasíðu

**Hjá P/F Wenzel í Havn hava tey nú fingið eina einfalda og framkomna heimasíðu, www.wenzel.fo, sum er sera løtt at arbeiða við hjá starvsfólkum. Designarin av heimasíðuni er Olav Petersen, langabbasonur gamla Wenzel Petersen**

WWW.WENZEL.FO
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Tað verður meira og meira brúkt at fólk vitja tær ymisku heimasíðurnar hjá bilasølunum, tá tey hyggja sær eftir einum nýggjum ella brúktum bili. Hjá Ford umboðnum, P/F Wenzel, hava tey nú fingið eina einfalda og framkomna heimasíðu, sum er gjørd av Olav Petersen, sum býr í Odder, sunnan fyri Århus.

Olav er 29 ára gamal og útbúgvin heimasíðudesignari. Hann hevur specialiserað seg í í ASP (Active Server Page). Nú hevur hann gjørt eina sera einfalda heimasíðu, sum er løtt at arbeiða við, bæði hjá starvsfólkunum í fyritøkuni og hjá brúkarunum.

Hjá starvsfólkunum er skipanin so løtt at arbeiða við, at um tey als einki halda seg duga við teldum, kunnu tey uttan trupulleikar logga seg inn og broyta ella uppdatera heimasíðuna eftir egnum ynski.

Olav er langabbasonur stovnaran av fyritøkuni, Wenzel Petersen. Tað hongur soleiðis saman at Johs Petersen var sonur Wenzel Petersen, og stjórin hjá P/F Wenzel, Petur S. Petersen, er sonur Johs, og Olav er sonur Petur.

Petur og konan Margrethe, sum búgva í Vestmanna, eiga seks børn, fýra dreingir og tvær gentur. Olav er nummar 4 í røðini.

## Toyota við í Topp-3



Toyota liggur nú sum nummar trý á mest umfatandi týsku kanningini hjá ADAC Auto MarxX um "besta bilmerki". Hetta er fyrstu ferð at eitt ikki týskt bilmerki kemur so langt. Nr. 1 er Mercedes-Benz og nr. 2 er BMW

*Kelda: www.bilpriser.dk*

## 1. millión Mégane II



Eftir at hava verið á marknaðinum í 20 mánaðir, eru longu seldir 1 millión av nýggja Renault Mégane II. Bilurin er ein av mest seldu bilum í Evropa

*Kelda: Volvo Personvogne A/S*

## Fleiri stjørnur til Golf



Nýggi VW Golf fekk nýliga fleiri stjørnur í EuroNCAP krasjtestunum. Hann fekk t.d. góðan karakter fyri vernd av børnum í bilinum og fyri at vera sera fótgangaravinarligur

*Kelda: www.semler.dk*







**Á heimasíðu okkara www.trygging.fo hevur tú møguleika at síggja skaddar bilar og prutl, sum vit hava til sølu**

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
*- so ert tú tryggari*